# Amy Fuglø við endurminningum hjá mammuni

*Min Færøske Barndom* er heitið á eini bók, sum kemur út í Danmark hósdagin 15. januar.

Tað er Amy Fuglø, búsitandi í Kongsted, nærhendis Faxe, ið hevur skrivað bókina, sum eru endurminningar hjá mammu hennara Sigrid Fuglø.

Amy Fuglø var fødd í Danmark í 1943. Hon búði eitt tíðarskeið í Føroyum og arbeiddi sum barnafysioterapeutur á Skúlanum á Trøðni, tey árini hon búði í Havn frá 1968-1982. Hon var gift við Frits Jager, sum var lærari á Adventistaskúlanum. Tey eiga synirnar Robert, sum býr í Norra, og Tommy sum býr í Danmark.

Bæði foreldrini hjá Amy vóru fødd á Viðareiði, mamman Sigrid í 1915 og pápin Elenius í 1910, hann andaðist í 2001, 90 ára gamal. Foreldrini fluttu til Danmarkar í 1930-unum.

Tá mamman í 2006 fekk staðfest diagnosuna Alzheimers, avgjørdi Amy at taka sær tíð til at lurta eftir og skriva niður áhugaverdu søgurnar frá tí at mamman var ung á Viðareiði fyrst í 1900-talinum.

Mamman var egnavitni til lívið í Føroyum. Hon búði í norðastu bygdini í Føroyum, og tey livdu uttan elektrisitet, olju, gass, bilar og telefonir við kúm í kjallaranum, við seyði í haganum, fiski í havinum og torvi í haganum.

Bókin er um bøndur og fiskimenn og lívið við tuberklum, trúgv, samanhaldi, spjaðing og nógv ymiskt annað. Nógvar myndir eru í bókini, sum eisini er ein ættarsøga um familjuna.

Bókin er upp á 294 síður og verður at fáa í bókabúðunum í Føroyum. Hon er gjørd á forlagnum Underskoven: www.underskoven.dk

**mg**



*Amy Fuglø við bókunum Min Færøske Barndom*



*Sigrid Fuglø við bókini*




*Bókin er prýdd við mynd av mammuni sum smágenta og mynd av Viðareiði*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Thorleif Mouritsen**, ættaður úr Sørvági, andaðist mikudagin í Dalvík í Íslandi, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Sigurd Danielsen** á Sandi andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Dagurin

**9. januar. Julianus**. Búði í Egyptalandi, og varð umleið ár 300 hálshøgdur, tá ið rómverski keisarin Diokletianus legði eftir teimum kristnu

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Olanta Hansen**

andaðist og varð jarðað.
Takk til Svenning á Lofti og Sonju Klein fyri góð og troystarrík orð í Landssjúkrahúskapellinum, Havnar kirkju og við grøvina.
Vit takka teimum, sum hjálptu okkum í sambandi við jarðarferðina, eins og teimum, sum vóru um hana hennara síðstu tíð á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Tey avvarðandi*

**Høgni, Andrew, Kári og Helen v/ familjum**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Sigurd Danielsen**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin, 85 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 14.30.
Jarðarferðin verður úr Sands kirkju sunnudagin kl. 12.30.

*Vegna tey avvarðandi*

**Turið og børnini**

Tey, ið vilja minnast Sigurd, kunnu lata eina peningagávu til Sands kirkju, konta í peningastovnunum.